Kunningarskriv 27. okt. 2000

Fá meira burturúr lønini

TK Stovan skipar fyri kunningarfundi undir heitinum »Bonusløn sum effektiviseringsamboð«. Endamálið við tiltakinum er partvís at greiða frá, hvar føroysk virki (privat, hálvalmenn og almenn) eru í dag, tá talan er um nýtslu av ymiskum lønarhættum fyri at fáa betri effektivitetsstýring og partvís eisini at lýsa støðuna á hesum øki í Danmark.

Fyrilestrahaldararnir fara allir at greiða frá sínum evni sæð bæði í einum tíðarhøpi (fyrr, í dag og í framtíðini) og í einum hierarkiskum høpi (tímalønt fólk, millumleiðarar, deildarleiðarar, fulltrúar og leiðslan á virkinum).

Ólavur Gregersen, leiðari og nýliga setti ráðgevin Jákup Mørkøre fara at lýsa støðuna á privata arbeiðsmarknaðinum í Føroyum. Ymiskar fortreytir verða viðgjørdar. Hugt verður at hvørjar akkordskipanir og bonuslønir verða nýttar innan fiskivinnuna og byggivinnuna v.m., og somuleiðis, hví hesar og aðrar skipanir verða so lítið nýttar í Føroyum.

Thomas Magnussen, leiðari á lønardeildini hjá Fíggjarmálastýrinum, fer at greiða frá verandi og komandi møguleikum fyri ymiskum skipanum innan almennar stovnar (og hálvalmennar stovnar). Thomas fer m.a. at greiða frá nýggjum lønarskipanum, har ein t.d. fær lut í effektiviseringsvinningi num. Hann kemur at viðgera úrslitstreytaðar lønir, kontraktstýring og úrslitskontraktir. Eisini verður nomið við fyrimunir og vansar. Thomas fer eisini at viðgera gongdina í øðrum londum, m.a. hvussu ein politiskt stýrir stovnum, og tann týdning hetta hevur fyri lønarskipanina.

Sten Nikolaisen frá lønardeildini hjá Dansk Industri greiðir frá danska arbeiðsmarknaðinum og lønásetan í donsku vinnuni yvirhøvur. Hann fer at viðgera »resultatløn«, sum tosað verður um í dag, úr ymiskum sjónarhornum, bæði út frá starvi, persóni og úrslitum, fyrimunum og vansum. Hann kemur inn á fleiri dømi. Somuleiðis fer Sten at tosa um resultatløn fyri bólkar og einstaklingar og fyri ymsu liðini í einum virkisbygnaði. Eisini verður nomið við »share holder value« og partabrævaoptiónir. Hann kemur somuleiðis inn á altjóða gongdina á hesum øki.

Ætlanin er, at luttakararnir kunna skifta orð millum fyrilestrarnar

Kunningarfundurin verður á Hotel Føroyum mánadagin 6. november 2000 kl. 13:00. Áhugaði kunnu tekna seg á TK Stovuni, tlf. 31 73 66 ella teldupost tk@tk.fo. Kostnaðurin er 350 kr. uttan MVG.

Ynskja tit fleiri upplýsingar, eru tit vælkomin at seta tykkum í samband við Ólav Gregersen, leiðara ella Jákup Mørkøre, virkisráðgeva

TK Stovan
tlf. 317366, fartelefon 217366/ 21 73 69
ella teldupost
og@tk.fo / jm@tk.fo

VIÐMERKINGAR

Hvat er fullveldisskattur?

Marjus Dam
løgtingsmaður

(Svarið stendur undir greinini)

Um fullveldið verður framt, so skulu teir krevja inn 25 brennioljuavgjøld afturat núverandi. Hvussu kann loysingarsamgongan so fremja ein skattalætta? Vanliga kalla vit tað at krevja meira inn í skatti eina skattahækking!

Landstýrið umboðar ein politiskan meiriluta – við Fólkaflokkinum á odda. Úrslitið verður møguliga loysing. Rokningin verður skattahækking uppá 110 milliónir afturat um mánaðin. Til sammetingar kann nevnast, at ídag er landsskatturin uml. 110 milliónir um mánaðin. So beinleiðis skatturin skal áleið fordoblast fyri at fylla upp holið eftir at blokkurin verður tikin burtur. Tí eru tað bert Sambandsflokkar í kunnu tosa um skattalætta. Loysingarflokkar við Fólkaflokkinum á odda kunnu bert bjóða øktar skattir – sera nógv oktar skattir!

- Fólkaflokkurin tykist í verki at hava slept øllum skattalættapolitikki. Tað er enn okkurt oratoriskt Breckmanskt sprell á skattaøkinum. Tí sítt egna skattauppskot tykist Fólkaflokkurin ikki tora at leggja fram – uttan at krevja somu upphædd innaftur samstundis, við eini pensiónslóg! Í veruleikanum er skatturin øktur hjá føroyingum undir leiðslu Fólkafloksins higartil í valskeiðnum. Tak t.d. brennioljuavgjaldi, ið er hækka heldur enn avtikið, ið vit mæltu til.
- Tað er volapyk at tosa um fullveldið og ein skattalætta.
- Um hægsta ynski hjá loysingar løgmanninum Annfinni Kallsberg verður framt, so koma umleið 100 milliónir at minka av fíggjarlógini hvønn mánað. Og tað skal krevjast inn við tilsvarandi øktum skattum. Tað veit Fólkaflokkurin, og tí undrar tað, at teir koma fram við sjálvt einum lítlum skattalættauppskoti. Ella er skattalætta uppskotið eitt tekin uppá, at teir ikki trúgva uppá eitt fullveldi?
- Um um teir trúgva uppá fullveldið, so hevði verið meira realistiskt at komið við uppskoti, ið hækkaði skatt føroyinga við 110 milliónum um mánaðin.
- At loysingin við slíkum drepandi skattatrýsti leggur alla menning og fíggjarligan framburð í grús, tykjast hesir Christiansborg fararar (uppá almenna rokning) at hava gloymt. Eisini hava teir nú í 3 ár gloymt, at føroyingar fingu eitt vallyfti um, at skatturin skuldi lækkast. Tvørturímóti, so er skatturin hækkaður! Allur skilagóður politikkur hevur ligið lamskotin, tí teir arbeiða við fullveldi. Ikki hava vit sum tjóð ráð til fullveldistvassi og jabbi.

Okkara loysn:

- Sambandsflokkurin vil broyting á Ríkisrættarliga økinum.
- Men vit vilja hava eina góða loysn innan Ríkisfelagsskapin.
- Okkara loysn merkir økt rættindir og møguleikar. Livistøði kann halda fram at vaksa. Tað kann loysingin ikki bjóða. Tí er okkara loysn loysnin.
  Okkara loysn gevur møguleika fyri at avtaka oljuavgjaldið, umframt skattalætta
- Sambandsflokkurin vil at føroyingar skulu liva í Før oyum – við minni skatti enn í dag.

(Hvat er Fullveldisskattur?

Svar: Núverandi skattur faldaður við uml. 2.

Fjølmiðlar og fiskiskapur

Tíðindaskriv

Tað tykist sum eingin endi er á teirri skipaðu herferð, ið føroysku fjølmiðlarnir eru farnir undir móti týdningarmestu vinnugrein í føroyska samfelagnum – nevnliga veiðiliðnum.

Fyrst hava bylgjurnar gingið høgt um rættin til tilfeingið. Hetta tilfeingið, sum menn – og nú eisini partvís kvinnur – í árhundraðir hava røkt og sett lív og heilsu til, til gagns fyri alt hitt føroyska samfelagið. Hvør einasta sál í Føroyum livir so ella so av tí, sum fiskað verður.

Seinasta álopið eitur prísirnir á toski. Nú verður veiðiliðið lagt undir at taka grundarlagið undan øllum teimun smáu virkjunum, tí prísurin á toski er alt ov høgur. Ein rúgvusmikil útgreining í Útvarpi Føroya hóskvøldið 26. oktober boðar frá, at fleiri fiskakeyparar nú kenna seg hóttar av gongdini í fiskaprísunum. Sjálvandi verður ikki sagt hvaðan tíðindini koma frá, og sjálvandi verður ikki sagt eitt orð um, hvussu stór mongd av toski fekk topprísin 30 krónur fyri kilo. Nei, tað verður snildisliga lagt upp til at geva føroyingum ta fatan, at henda skandalan er galdandi fyri tosk sum heild. Um rætt var vorðið, átti hetta at verið borið fram sum ein sólskinssøga.

Tað skuldi ikki verið neyðugt í einum samfelag sum tí føroyska at farið í verjustøðu um eitt mál sum hetta. Sannleikin er, at tað er ikki veiðuliðið – sjómenn og skipaeigarar – sum ásetir prísin á fiski. Tað var tann tíð, tá tað almenna ásetti prísin, og hana minnast vit væl. Avleiðingarnar fyri alt samfelagið eru eisini kendar. Í dag eru tað keypararnir – ella marknaðurin – sum ásetir prísin alt eftir útboði og eftirspurningi, og soleiðis eigur og fer tað eisini at verða framyvir.

Um eitt virki á landi ætlar at framleiða eina bíliga vøru úr einum dýrum rávevni, so er okkurt, sum ikki ruggar rætt hjá viðkomandi. Um viðkomandi umvegis fjølmiðlar ætlar at broyta hetta og á henda hátt ávirka politikkarar og fólk annars at hjálpa sær, so fara teir ógvuliga skeivir.

Ráfiskaseljarafelagið, sum umboðar allar teir, sum fiska og landa eina dygdarvøru til bæði føroyska og útlendska marknaðin, vil við hesum gera púra greitt, at tað ongantíð aftur fer at góðtaka, at framleiðarar fara at fáa eina rávøru fyri undirprís sum við tógvi stríð og stórum hegni verður fingin til høldar. Felagið hevur mælt til og hevur framvegis ta áskoðan, at um fiskivinnuni skal verða lív lagað, so eiga fríar marknaðartreytir at vera galdandi. Veiðiliðið hevur góðtikið hesar treytir og lagað seg eftir teimum, og vit góðtaka als ikki at ávísir framleiðarar ella frøðingar, enn einaferð fara at broyta tey viðurskiftini.

Tórshavn, 27. okt. 2000
Abraham Løkin,
formaður

ítróttur

Nr. 214 • t‡sdagur • 7. november 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo

Kári Reynheim skal venja B71



Kári Reynheim skal nú fyri fyrstu fer› standa á odda fyri føroyskum fyrstudeildarli›i›, og á Sandi eru tey ikki í iva um, at tey hava tiki› eina rætta avger›

Eftir at hann í nøkur ár hevur virka› sum venjari í Noreg, vendir Kári Reynheim nú heim til Føroya

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

Leygardagin kom venjaraspurningurin hjá B71 upp á pláss, solei›is at hesin partur av fyrireikingunum til komandi kappingarár ikki liggur eftir.

Talan er um navnfram Kára Reynheim, sum seinnu árini hevur búleikast í Noreg, har hann í fjør var vi› til at tryggja› Jotun uppflytan upp í tri›bestu norsku deildina.

Í samrø›u vi› Sosialin seg›i Kári Reynheim ta fer›ina, seg›i Kári, at ta› fór at gerast sera trupult at halda li›num í deildini hetta kappingarári›, og ta› vísti seg eisini, at hann fekk rætt í hesum.

Eftir eina heldur laka byrjan, har úrtøkan ikki hev›i veri› tann heilt stóra, var› Kári tá sagdur úr starvi eftir sjey dystir, men eftirfylgjandi kann helst sta›festast, at ta› so ikki var naka› gali› vi› venjaranum. Jotun tapti nevnliga 12 teir næstu dystirnar, og eftir komu bert tr‡ stig til høldar.

Nógvir fyrimunir

Av Sandi ver›ur sagt, at ta› er vi› spenningi, at teir nú bí›a eftir, at n‡ggi venjarin skal fara undir virki sítt.

– Vit hava arbeitt vi› hesum í okkurt um ein mána›, og eg má siga, at vit so avgjørt ikki hava havt nøkur fyrivarni í huganum, tá avtalan var› gjørt, sigur eli Hentze, sum umframt at spæla á besta li›i felagsins eisini er nevndarlimur.

– Fyrimunirnir vi› hesum eru eftir okkara tykki heilt nógvir. Vit fáa ein venjara, sum hevur eina stak gó›a útbúgving, nógv betri enn fleiri a›rir her á landi, og umframt fakliga førleikan hevur Kári eisini tann fyrimunin, at hann er føroyingur og kennru til vi›urskiftini her hjá okkum, sigur Eli um avger›ina.

Í ár var danin, Per Langvad, venjari hjá sandoyingum, men sum skilst, so var ikki stórvegis áhugi í at leingja hetta samstarvi›.

Herfølge er á botninum

Ta› tykist í løtuni ivasamt, hvørt Faxe fer at halda fram sum venjari hjá Herfølge komandi kappingarár. Millum sigt AB vera áhuga í at fáa fatur á fyrrverandi landsli›sleikaranum

Ta› ljó›ar í danska fótbóltsheiminum, at møguleiki er fyri, at John Faxe Jensen longu í vetur fer úr felagnum

SUPERLIGA
Jóannes Hansen

Ta› er stórur munur á, hvussu fótbóltslagi› var í Herfølge í gó›ve›rinum tí›liga í summar, og so tí, sum er í heystarve›rinum í lítla b‡num á Sælandi. Fyri einum lítlum hálvum ári sí›ani vóru ásko›ararnir nógvir, ta› var tætt millum sigrarnar, og ta› enda›i vi›, at Jákup Mikkelsen og teir stó›u vi› gullkrónum um hálsin, stórum DM steypi í føvninginum og atgongumerkjum til innlei›andi umfari› í europeisku meistarakappingini.

Nú er Herfølge næstaftast í superliguni. Í kvøld skulu Jákup Mikkelsen og teir spæla á heimavølli í UEFA Cup. Ásko›aratali› ver›ur neyvan naka› serligt omanfyri tey eitt túsund. Dysturin í Aten var› taptur 5–0, og John Faxe Jensen og hansara menn hugsa nú fyrst og fremst um, hvussu teir skulu sleppa upp um ni›urflytingarstrikuna. Komandi vikuskifti skulu teir spæla í Århus ímóti AGF, sum tær sí›stu vikurnar hevur havt so blí›an byr, at alt talar fyri heimasigri. Ta› vil vi› ø›rum or›um siga, at ta› hjá Herfølge ver›ur uppaftur longri upp til eitt av li›unum, sum teir higartil hava kappast vi›.

Órógv kring venjaran

Umframt soltnu úrtøkuna, so skulu teir í Herfølge nú eisini hugsa um venjaraspurningin og um, hvussu ta› ver›ur vi› spælaratilfari komandi ár. John Faxe Jensen hevur sáttmála vi› Herfølge fram til summarste›gin. Ta› hevur ljó›a›, at samrá›ingar hava veri› millum venjaran og felagi› um n‡ggjan sáttmála, men so hevur eisini ljó›a›, at venjarin hevur samrá›st a›rar vegir.

Í vikuskiftinum ljó›a›i, at John Faxe Jensen samrá›ist vi› AB. Ta› var til hetta felagi›, at Ole Mørch í síni tí› fór, tá hann fór úr venjarastarvinum í Herfølge. Sí›ani summarste›gin hevur gingi› av skri›uni hjá AB, og nú ljó›ar, at ætlanin er, at John Faxe Jensen skal hava ábyrgdina longu í vetrarste›ginum. Hesi tí›indini eru avgjørt ikki naka›, sum betrar um lagi› í Herfølge.

Spurningurin er eisini, hvussu ta› ver›ur vi› spælarunum komandi ár. Ta› veldst ikki minst um, um felagi› framhaldandi fer at spæla í bestu deildini, ella um teir flyta ni›ur í næstbestu deildina.

Ein av spælarunum, sum bara hevur sáttmála fram til summarste›gin, er Jákup Mikkelsen. Reglurnar siga, at ta› er spælarunum loyvt at samrá›ast vi› onnur feløg, tá eitt hálvt ár er eftir at sáttmálaskei›num. Enn hevur Jákup Mikkelsen einki sagt, um onnur feløg hava følt seg fyri, men ta› er einki at ivast í, at ta› hev›i veri› ein ítróttarlig avbjó›ing hjá føroyska landsli›smálverjanum at komi› til okkurt anna› felag nú. Jákup hevur veri› í Herfølge sí›ani á sumri í 1994.

Taptu enn eina fer›

Fríggjakvøldi› hev›i Herfølge vitjan av Lyngby, sum telist millum oddali›ini. Í 1. hálvleiki var ta› sera sjónskt, at talan var um uppger› millum topp og botn. Lyngby leg›i stórt tr‡st á heimali›i›, og tá fyrra umfari› var hálvrunni› høvdu teir longu fingi› tvey mál. Hitt fyrra var› stúta› eftir horna, og hitt seinna var ein heppin takling av brotsteigarmarkinum, sum Jákup Mikkelsen ongan møguleika hev›i at gera naka› vi›.

Beinanvegin eftir ste›gin økti Lyngy til 3–0, og teir høvdu fleiri møguleikar at skora uppaftur fleiri mál. Mi›vøllurin hjá Herfølge, sum lei› undir at tríggir stu›ulsspælarar vóru leikbanna›ir, var sera tunnur. Fleiri fer›ir fingu mótstø›umenninir høvi at renna einsamallir ímóti málinum hjá Herfølge, men teir fingu ikki fleiri mál, n. a. tí Jákup Mikkelsen dugdi væl at lesa stø›urnar av.

Eftir 65 minuttir og 84 minuttir minka›i Herfølge um munin. Men ta› gjørdist ongantí› rættuligur spenningur um, hvagar sigurin og tey tr‡ stigini skuldu fara.